# 2005

## ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR




# ÍF – TB

**FORMULADEILDIN**

**Sunnudagin 1. mai 2005 Kl. 15.00 í Fuglafirði**

HAVSBRÚN

formuladeildin

TOYOTA MIKLAGARÐUR P/F Petur Larsen

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel 444636 / 228771
Fax 444634
www.if.fo
if@if.fo

**Leikskrá 2 2005**

**Útgevari:**
**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
**ÍF-stuðlar**

**Ábyrgd**
ÍF-stuðlar

**Blaðnevnd**
ÍF-stuðlar

**Myndir**
Álvur Haraldsen
Jens Kr. Vang
Jonhard Hammer
Sosialurin

**Kápumynd**
Gunnar Nielsen tekur dystin upp við tveir skálamenn
*Mynd: Jonhard Hammer/Sosialurin*

**Prent**
Estra

**Uppseting**
Sisero 351800

TAÐ HALDA VIT

# ÍF HEVUR ROYNDIRNAR

Vælkomin í Fløtugerði til dystin ÍF-TB anno 2005. Hetta er tann fyrsti dysturin hjá TB í Fuglafirði nú teir aftur eru 1. deild, og tí skulu teir eisini verða sera vælkomnir.

TB er elsta felag í Føroyum, og kunnu teir vera ernir av longu stoltu søgu felagsins. Hvørt mansbarn í Føroyum hevur ikki onkuntíð murrað ella sungið við til sangin: "Eitt fótbóltslið, sum TB, ei vit hava sæð, teir vunnu bæði HB, og onnur lið so fræg", og so hava vit ímyndað okkum, hvussu hugnaligt og spennandi tað var, tá teir løgdu frá landi, og stevndu til Hetlands at leika dyst, og vinna á fremmandu grannatjóðini, sum vit ikki kendu serliga nógv til.

Nú hevur TB eitt ungt nýtt lið, har bert eitt navn, blunkar bjart á talvuni, nevniliga navnið: "Óli Johannesen", sum áskoðarar í øllum Føroyum kenna sum seinasta skansa á landsliðnum. Vit hava í øllum fylgt Óla, elskað hann fyri gott verjuspæl í eitt mannaminni, skeldað út um brotsspørk hann gjørdi, og fyri brendar "direktørar", men samanumtikið hevur Óli tey seinastu mongu árini verið okkara maður á landsliðnum. Í dag er hann liðformaður hjá TB, barndómsfelagnum, sum hann loksins hevur valt at leika við, nú hann má sigast vera rættiliga tilkomin í fótbóltshøpi. Hvør dregur longra stráið í dag, kunnu vit ikki siga so nógv um, bert vóna tað besta. Vit halda sjálvandi, at ÍF er betra liðið, og skuldi havt fyrimun, tí vit hava royndirnar frá seinasta ári, tá lið okkara, sum uppflytari, var í somu støðu, sum TB er í dag. Sjálvsagt eiga hesar royndir at koma liðnum til góðar í dag.

Tað hava verið nógvir tættir, og ógloymandi spennandi dystir millum hesi bæði liðini, sum einaferð taldust millum tey allarbestu. Tað má sigast, at nógv vatn er runnið í Skarðsá, síðan ÍF á fyrsta sinni fekk stig frá TB í bestu deildini. Hetta var í 1971; fyrsta árið ÍF leikti í meistaradeildini, sum tað tá æt. Tá fekk ein 2 stig fyri vunnan dyst, og ÍF vann bert 2 dystir og fekk sostatt 4 stig – 2 stig fyri at vinna B36 og 2 stig, tí at TB ikki møtti í Fuglafirði til seinasta dystin. Nú eru teir her, 3 stig eru at spæla um, og vit ynskja øllum góðan dyst.






Í dag vitjar 1. lið hjá elsta fótbóltsfelagnum í landinum, TB, okkum. Eftir eina eitt sindur trilvandi byrjan í fjør, megnaðu teir at stabilisera liðið og avrikini, soleiðis at teir vunnu næst bestu deildina rímuligt trygt. Vit vita sjálvir, hvussu torført tað er – ella í øllum førum kann vera – at vera uppflytari og klára seg í bestu deildini. Ikki bara síðsta ár, men eisini tey undanfarnu árini, vit hava verið uppflytarar. TB hevur megnað at varðveitt flestu av leikarunum í fjør, samstundis sum teir hava fingið onkran nýggjan leikara, t.d. Aleksander, sum spældi við NSÍ síðsta ár. Harafturat eru fleiri ungir og evnaríkir leikarar komnir á liðið.

Síðani 1981 hava vit leikt 16 ferðir í móti TB í bestu deildini. Vit hava vunnið 5 ferðir, spælt javnt 4ferðir og tapt 7 ferðir. Málmunurin er 19 – 29 til fyrimun fyri TB. Hesi hagtøl kunnu broytast í dag, men tað krevur ein innsats av okkara monnum, sjálvt um mótstøðuliðið spæla í 1. deild fyri fyrstu ferð í trý ár.

### TB ikki "fyri nothing"

TB hevur nevnliga víst í teimum fyrstu umførunum av landskappingini, at teir ikki er "fyri nothing". Teir hava higartil fingið 5 stig í tveimum javnleikum og einum tryggu 3-0 sigri á EB/Streymi síðsta vikuskiftið. TB spælur verjukendan fótbólt, við nærum øllum leikarum aftanfyri bóltin allan dystin, og síðani vóna teir at fáa okkurt málið í skjótum mótálopum. Hetta hevur – undantikið dystin á Skála, sum teir taptu 5-1 – hepnast væl. Tí skulu vit nokk í dag halda tempo, verða tolnir í álopsspælinum og varnir í verjuspælinum.

Til dystin í dag eru allir menn tøkir. – Hanus varð ikki við í Runavík síðsta vikuskiftið, men hann er tøkur aftur, samstundis sum Gunnar – eftir lítlan skaða – eisini hevur vant 100%. Sylla hevur framvegis smátrupulleikar, men er tøkur til dystin. Áki sær eisini út til at vera komin væl fyri seg og Allan merkir einki til

Framhald á bls. 7

Rustviðgerð
ella forrútar
vit hava loysnina
BE AUTOGLAS
Í Brekkum 1
530 Fuglafjørður
tel. 444 215
fax 444 813
fartel. 220 876




GRANNSKOÐARASTOVAN Sp/f
480 Skála tel. 44 16 66 fax 44 18 71






# TIPS 13

## VEDDA OG VINN VIÐ BIRGARI OG JANUSI

| 1. UMFAR (set x í rætta rútin) | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|
| 1. Hvussu eitur venjarin hjá PSV?<br>1. Ruud Gullit X. Guus Hiddink 2. Dick Advocaat | | | |
| 2. Hvør leikari er kosin ársin leikari í Onglandi kappingarárið 2004/2005?<br>1. Frank Lampard X. John Terry 2. Petr Cesc | | | |
| 3. Hvussu eitur heimavøllurin hjá PSV?<br>1. Phillips Stadion X. Stadium De Meer<br>2. Galgenwaard Stadium | | | |
| 4. Real Madrid hevur aftur víst einum donskum landsliðsleikara áhuga. Hvør er hesin?<br>1. Jesper Grønkjær X. Per Krøldrup 2. Kenneth Perez | | | |
| 5. Hvat kallaði ÍF-fjepparin, Ólavur, dómarin, Páll Augustinussen, sum dømdi dystin ímillum okkum og B36, alment í Dimmalætting?<br>1. Rey...hol X. Idiot X. Nissa | | | |
| 6. Hvussu eitur formaðurin hjá TB? 1. Sofus Laðanberg X. Oddur Dimon 2. Jóan Petur Olgarsson | | | |
| 7. Hvussu kallast fótbóltssendingin hjá ÚF, sum er hvønn sunnudag meðan fótbólturin er?<br>1. Runt um bóltin X. Fótbólturin 2. Bólturin | | | |
| 8. FCK krevur uml. eina mió. krónur frá einum italskum felag í sambandi við at málverjin Rune Pedersen fór frá FCK til italska felagið. Hvat italskt felag er talan um? 1. Verona X. Modena 2. Messina | | | |
| 9. Hvar verður UEFA cup finalan í ár leikt?<br>1. José Alvalade í Lissabon X. Del Alpi í Torino<br>2. Bernabeu í Madrid | | | |
| 10. Hvørjir eru teir báðir nógv umrøddu høvuðsvenjararnir hjá Superligaliðnum OB?<br>1. Lars Høeg og Kim Brink X. Troels Bech og Klavs Rasmusen 2. Uffe Pedersen og Søren P. Jørgensen | | | |
| 11. Hvussu eitur kendi danski fótbóltsfrásøgumaðurin, sum júst hevur lagt frá sær at varpa út landsdystir hjá danska landsliðnum? 1. Birger Peitersen X. Jens-Jørgen Brinch 2. Sven Gehrs | | | |
| 12. Hvat hálendskt lið er í hálvfinaluni í UEFA cup?<br>1. Alkmaar X. Heerenveen 2. Waalwijk | | | |
| 13. Hvør er høvuðsstuðul hjá B36<br>1. Føroya Tele X. Føroya Shell 2. SMS | | | |

Føroya Bjór ATLANTIC AIRWAYS

Klipp ella skræð

Navn: Bústaður: Telefon:

Aftur í ár skipa teir báðir Birgar og Janus – sum nú báðir búgva í ávíkavist Keypmannahavn og Aberdeen – fyri kappingini "vedda og vinn við Birgari og Janusi". Besti tipparin í einstøku kappingunum vinnur ein kassa av sodavatni frá Føroya Bjór. Umframt vikuvinningin sleppa allir 12 vinnararnir út at bowla saman við 1. liðsleikarunum eftir kappingina. Vinnararnir eru eisini við í lutakastinum um ein flogferðaseðil frá Atlantic Airways.

Fyri at luttaka og vinna, skalt tú seta kross í tann rútin (1, X ella 2), ið tú heldur/veitst eru rættir. Skrivað navn, bústað og tlf.nr. og lat hann inn í ovaru hædd í Ítrottarhúsinum undir ella beint eftir dystin. Tann ella tey, sum hava svara flest spurningum rætt - í minsta lagi 9 - eru við í lutakastinum um sodavatns-kassan. Góða eydnu!

Røttu svarini til spurningarnar hesaferð fært tú at vita í næstu leikskrá.

Fuglafjarðar Træsmiðja

Snikkaraarbeiði
• Vindeygu
• Úthurðar
• Trappur
• Umvælingar

Tel: 44 42 34
Tel: 21 42 34
Toftagøta 12
530 Fuglafjørður

Fuglafjarðar Træsmiðja
við Jóhan Larsen

fk
Fuglafjarðar
Keypsamtøka
Tel. 444 095 - 444 495 Fax 444 895

FAXE KONDI



Framhald frá bls. 3

ógvusliga skaðan hann fekk á Skála. Tí verður spennandi, hvussu venj-arin fer at seta liðið. Neyvan verða tær stóru broytingarnar í mun til dystin í Runavík síðsta vikuskiftið. – Tað kann vera, at Gunnar byrjar inni ístaðin fyri Sylla, í álopinum. Tað kann eisini vera, at Magni, sum tykist at verða væl meira vandamikil, tá ið hann verður skiftur inn, byrjar á beinkinum, og Sylla og Gunnar byrja í álopinum.

Seinastu tveir dystirnar ímóti ávíkavist B36 í Fuglafirði og NSÍ í Runa-vík, hevur tað tykist sum um okkara leikarar ikki verið 100% klárir frá dyst-arbyrjan. Petur og Sonni skulu hava rós fyri, at teir megna at seta leikararnar upp, sjálvt um mótgongd, men í longdini gongur hetta ikki. Tað sóu vit t.d. ímóti B36, sum legði seg lutfalsliga tíðliga í dystinum framum við tveimum málum, og so varð dysturin nærum avgjørdur.

Vit á bakkanum vóna, at tit í dag geva tykkum 100% allan dystin, og ikki tá ið mótstøðuliðið er komið framum. Men í verandi løtu eru vit væl mannaðir, og tað hevur við sær, at vit hava gott fólk at seta inn, um tað skuldi hent, at onkur av leikarunum ikki spælir upp til sítt besta. Drívið á dreingir!



# ÁSKOÐARIN HESA FERÐ ÓLAVUR LARSEN

**TÚ**
**Navn:** Ólavur Larsen
**Føðingardagur:** 13.10.83
**Starv:** Handilsskúlanæmingur
**Frítíðarítriv:** Fótbóltur
**Vónir fyri 2005:** At ÍF vinnur meistaraheitið, og at Páll og Eiler gevast at døma

**FÓTBÓLTUR**
**Hvussu nógvar dystir sært tú um árið:** 27, um 3. deild ikki spælir aðrastaðni samstundis



**Størsta styrki hjá ÍF liðnum:** Klára at koma uppaftur, tá teir eru í kolkjallaranum
**Størsti veikleiki hjá ÍF liðnum:** For linir frá fyrsta floytið, og tað kostar for ofta 1 mál ella 2
**Torførasta mótstøðulið:** B36 (vónandi)
**Minningarríkasti dystur hjá ÍF:** 4-3 ímóti GÍ í ár
**Lýs ÍF-liðið við trimum orðum:** Tekniskir, seinir og deyðbóltssterkir (offensivt)
**Um tú skal geva ÍF leikarunum, venjarum og hjálparfólkum góð ráð, hvørji vildu tey verið:** Fáa spælararnar betri uppsettar áðrenn dyst, so teir eru klárir beinanvegin, og at fáa spælið at ganga skjótari! Um vit klára tað, so banka vit øll liðini av!
**Hvat heldur tú um ÍF áskoðararnar:** ALT, ALT, ALT, ALT, ALT for linir!
**Hvørji trý lið heldur tú fara at enda ovast í ár:** ÍF, Skála og HB

**TÍNIR FAVORITTAR**
**Besti áskoðari:** Ullus á Toftum
**Besti fótbóltsleikari í Føroyum:** Morten Larsen tá hann var í FO
**11 teir bestu fótbóltsleikararnir í Føroyum:** Allan, Eyðolvur, Jonn, Poul, Fritleif, Hanus, Símun, Høgni, Elttør, Gunnar og Sylla ... Og so eru Magni og Bartal Føroya bestu innskiftarar
**Matur og drekka:** Einki er betur enn brasað riv og eina "kalda" afturvið
**Besta árið og hví:** 2006, tí at ÍF verða Føroyameistarar fyri aðru ferð í trekk, og Man. Utd. vinna Treble aftur.
**Slag av tónleiki:** Næstan alt, tó mest Queen, U2 og Kashmir v.m.
**Besta sending í SvF:** 3-2
**Besti filmur:** Golfbanens skræk (Happy Gilmore)
**At slappa av:** Sita hjá Fritleif og drekka ein kaffimunn, eta náttturða og roykja eina sigarett
**Besti fótbóltsleikari yvirhøvur:** Eric Cantona
**Stuttligasi persónur:** Trúgvi
**Sjónvarp/filmstjørna:** Adam Sandler
**Sangari/sangarinna:** Freddie Mercury
**Besta bók/blað:** Leikskráin hjá ÍF







Tilfar til umvælingar,
ábøtur ella annað ...
... spyr fyrst hjá okkum!

Fuglafjarðar Timburhandil
tel. 444 126



## Fjølbroyttur veitari til vinnuna

KJ er ein fjølbroytt fyritøka, sum veitir útgerð, eykalutir og tænastur til fiskivinnuna, alivinnuna, flutningsvinnuna og entreprenørvinnuna.
Í okkara úrvali av útgerð finst m.a. trolspøl, kranaspøl, marinekranar, lastbilakranar og gravimaskinur. Í okkara stóru eykalutagoymslu hava vit hydraulikkfittings, slangur, rør, pumpur, motorar, ventilar, koblingar, tetningsringar o.m.a.





- Spøl
- Kranar
- Hydraulikklutir
- Filtur
- Aliútgerð
- Katamaranar

KJ HYDRAULIK
POWER & MOTION CONTROL

P.O. Box 110 á Kambsdalur · Tel +298 444 170 · Fax +298 444 265 · info@kj-hydraulik.com · www.kj-hydraulik.com




Landsins **størsta** og besta úrval



*graveving íroknað prísin.*

FA **EILIF ARGE**
Tel. 455164 · Fax 457576 · faeilifarge@post.olivant.fo



## PLÁTUVERKSTAÐIÐ
v/ Glenn Perdomo

Undir Krákugjógv 5 Kj.,
Tórshavn tel 321778

## KUNNINGARSTOVAN Í FUGLAFIRÐI
INFORMATION OFFICE

*Opið:*

| | |
|---|---|
| *Mánadag - fríggjadag* | *kl. 9-12 og 13-17* |
| *Leygardag* | *kl. 9-12* |

FO-530 Fuglafjørður
Tlf. (+298) 44 48 60 - Fax (+298) 44 51 80
t-post: infoey-f@post.olivant.fo

## FUGLAFJARÐAR BÓKASAVN
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 44 47 45 - Fax 44 51 80
t-post: bokasavn@atlantic.fo

*Opið:*

| | |
|---|---|
| *Mánadag - fríggjadag* | *kl. 9-12 og 13-17* |
| *Leygardag* | *kl. 9-12* |




Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn,
Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
*- so ert tú tryggari*

formuladeildin



í altjóða kapping....

formula.fo

HAVSBRÚN

Tel. 41 44 00 • Fax 41 44 01 • havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

Lastvognskoyring



Øll lastvognskoyring verður gjørd

Kári Zachariassen

530 Fuglafjørður
tel 444 245 ella 217 245

BERGFROST
COLD STORAGE

P. O. Box 85
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
www.bergfrost.com

Tel +298 44 46 11
Fax +298 44 46 07
Mobile +298 22 36 67
bergfrost@bergfrost.com



# Fuglafjørður

býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak
býurin, har náttura og fólk eru blíð
býurin, har fortíð og nútíð hittast
býurin, har øldirnar tala

**Stutt sagt:**
býurin, har nógv hendir
býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar Kommuna**
P.O. Boks 30 · tel. 444006 · fax 444657
fko@fuglakomm.fo
www.fuglakomm.fo



**Rasmus Joensen**
Málarameistari
530 Fuglafjørður
Tel. 444 139 - 214139

**SANDGREVSTUR P/F**
Norður í Gerði 7
530 Fuglafjørður

Stovnað 1949 - reiðarí innan frakt- & sandbátar

- Norskur stoypisandur
- Hvítur stoypiskervur
- Hvítur skervur til tún
- Reyður skervur til tún
- Fø. stoypi- og pussisandur
- Rall
- Sandblásisandur
- Betongflísar

Koyring við kranalastvognum
fyri fastar prísir (eisini til Tórshavnar)
tel 444121 • 595900 • 595910



**Tannlæknastovan**
Steintór Larsen | tannlækni
Brynhild Maria Lamhauge | tannrøktari
Viðtala:
8.00-12.00 og 13.00-16.00
Torkilskrókur 8 | 530 Fuglafjørður | tel. 444 358



Vit
hava
útgerðina
VÓNIN
www.vonin.com




## Fysioterapiviðgerðarstova

Ítróttarhjálparútgerð við lágum prísum: t.d. tape, eingangs ís-posar og 1. hjálpar-/ "læknataskur"

530 Fuglafjørður
Telefon 44 51 44

Álvur Hansen, fysioterapeutur







**LEVI'S® RED TAB® JEANS**



Klæði til hennara,
hansara og børnini
- nu lat undir somu lon

**VØRDSLAN WEARHOUSE**

Í Støð 6, Fuglafjørður, tel 44 47 47

AVENSIS

TOYOTA




**Avensis**
Einastandandi dygd og koyrigleði.

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040 · Fax 353041
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

**REYNI SERVICE P/F**

VR BILAR
VOLVO
RENAULT







Teir nýggju Volvo S40 og V50
Prísir úr **276.000**

**VR-Bilar**

Hoyvíksvegur 61
FO-100 Tórshavn
tel 32 21 10
telefax 32 21 11
vr-bilar@vr-bilar.fo

Vit umboða eisini Volvo lastbilar, bussar og entreprenørmaskinur

**Opið er soleiðis:**
mánadag til fríggjadag: 08.00-17.00














**AP BUSSKOYRING**

*V/ Andreas Poulsen*

*fartel 505220 • 441720*







SSANGYONG
4x4
REXTON
Persónsvognur úr kr. 313.291,- v. mvg
Vøruvognur úr kr. 247.571,- v. mvg
Skaðaumvæling av øllum bilsløgum
á Hjalla FO-180 Hoyvík Tel 311013 www.kollsker.com
Bilverkstaðið
v/ Hans J. Kollsker


PrimaVera
ja, tað má tað vera!
Pizzaria
PrimaVera
á Kambsdali tlf. 444446


Handilin har tú fært
alt til heimið
• Innbúgv
• Maddrassur
• Dýnur
• Búnýti
• Seinjarklæðir
SKEMMAN
Heldur biligari


Vit hava stórt úrval av gløsum, serviettum, dúkum, ljósum og einnýtisborðbúnaði.
Ert tú í iva um mongd, lit ella støddd, ráðgeva vit tær fegin. Vit taka óásettar pakkar aftur.
Brúðleyp Dóp Veitslu
Merkisdag Meistaraheit
th-dam@post.olivant.fo
Thomas Dam á Hálsi
HÚSGØGN · LEIKUR · NÁTTÚRUDEILD · HEILSØLA
HEYKAVEGUR 3 · TLF. 31 14 00


Jørleif Petersen
málarameistari
Fuglafjørður
tel. 444 395 fartel. 214 395
Alt málaraarbeiði
verður gjørt!


Sp/f Jan Mohr
Byggivirkið
Tlf: 21 99 49 • 21 89 49


Hugsar tú um at byggja?
Tosa fyrst við okkum!
Her fært tú altíð eitt gott tilboð
Element-& Betongvøruvirkið
við Gjógv
Tlf. 423173-445173


Hugsa tygum um
útskifting ella nýbygging?
- royn okkum!
Vel snið, træsort og viðgerð
Send okkum uppskot
og vit geva tilboð
innan allar seruppgávur
Handverkið ger munin
TRÆSMIÐJAN
317166 GLT
Tórshavn • Tlf. 317166 Faks 318131 • Teldupostur: tra-glt@post.olivant.fo


døgg
.alt innan nýmótans hárviðgerð.
Halla Olsen
tlf. 219379
tlf. 445550
opið er:
mán - frí 10 - 17
hósdag 10 - 19
leygardag 10 - 14
Toftavegur 1 · 530 Fuglafjørður · tlf. 44 55 50


Jolly®


Hann ger tað ikki lættari at minnast
kotuna á bensinkortinum
Tann nýggi Suzuki Alto
koyrir í meðal 20,4 km.
uppá liturin
SUZUKI
Hann kostar bert:
Kr. 99.990,-
koyriklárur
Suzuki Alto er harafturat fyltur við útgerð so sum powerstýring,
dupult airbags, ABS-bremsum, sentrallás, el-rútum
SUZUKI Berg Motors SUZUKI
Staravegur 1-3, box 1039, 110 Tórshavn - Tlf 313535 Fax 317735

KLAKSVÍKAR AUTOLAKERING

BUMSHAMAR • 700 KLAKSVÍK • TLF. 458787 • FART. 223512 & 223513

Timbur-, betong- og jørðarbeiði

H.K.J. byggivirkið SpF
Postmoga 40
530 Fuglafjørður
Tel. 21 86 96 og 22 77 99
Fax 44 46 56

POUL JOENSEN
LAST & KRANAVOGNSKOYRING

- Last & Kranavognskoyring
- Mini Gravimaskinur
- Mini Lessari
- Útgrevstur við Brøyt
- Betong & Asvaltsaging
- Og mangt annað

Bøvegur 10
530 Fuglafjørður
Tlf: 44 46 42
Mobil: 21 31 95
Fax: 44 42 95









P/F Petur Larsen
Mekaniskur verkstaður

postboks 64
530 Fuglafjørður
tel. 444 174
fax 444 285
al@online.fo

BAADER®

fomaco















# Keyp eitt 1600pluss árskort

**og slepp ÓKEYPIS til heimadyst í Fuglafirði**

Kortið gevur tær ÓKEYPIS atgongd til ALLAR heimadystir felagsins, samstundis sum ÍF av og á bjóðar ánarum av 1600pluss kortinum til ein kaffimunn, prát o.a. í sambandi við heimadystir.

**Kortið kostar**

**kr. 1.600,00 fyri árið.**

Um ein ynskir at gjalda meira enn 1.600,00 fyri kortið, ber hetta eisini til.

1600pluss kortið kann bíleggjast í ítróttarhúsinum, á tel. 558107 ella við at senda teldupost til sil@post.olivant.fo. Til ber eisini at nýta bíleggingarskjalið, sum verður sent øllum húskjum í bygdini í komandi viku. So skjótt sum peningurin er fluttur á konto nr. 6460 – 167.770.7 ella 9181 – 140.181.7 verður kortið sent við postinum.



Alt vanligt verkstaðsarbeiði verður gjørt

ÚB

**Úrvalsbilar SpF**
v/ Magnus Onghamar

Bakkavegur 530 Fuglafjørður tel 444 943 fax 444 638

**Rasmussen & Weihe P/f**
statsaut. grannskoðarafelag

Heiðavegur • P.O. Box 154 • FO-600 Saltangará
tel 35 17 00 • fax 47 17 01
rasmussen@rasmussen.fo
www.rasmussen.fo

International: An associate firm of **PricewaterhouseCoopers**

**P/F Grannskoðaravirkið**

**INPACT**
**Statsaut. revisorar**

R. C. Effersøesg. 26, Tórshavn
Tel +298 31 47 00
Fax +298 31 38 15
inpact@inpact.fo
www.inpact.fo

**BREYÐMOLIN**
530 Fuglafjørður • Telefon 444388

# HER SÆRT TÚ, HVÍ TANN NÝGGI NISSAN ALMERA EITUR DELTA TIL EFTIRNAVN

BOCCA / petur & petur • 320870




Bilurin á myndini hevur eykaútgerð. Brennievnisnýtsla við blandaðari koyring: 14.9 km/l, CO2 útlát 160 g/km

**DELTA MERKIR ØKING**. Og tað kann vanliga ikki fáast meiri útgerð í Almera Delta. Hóast hetta kostar Almera Delta 1.8 við 5 hurðum bara **189.000,- kr.**

**3 ára mekaniskt garanti.**
**3 ára lakk garanti.**
**12 ára garanti ímóti gjøgnumtering**

NISSAN

**P/F Meinhardt Arge**
Tel 345400 • www.bilarge.fo

## Lítla sølubúðin í ítróttar-húsinum

Damurnar, sum síðstu árini hava havt sølubúð í ovaru hæddini í ítróttar-húsinum í sambandi við dystir hjá 1. liðnum, eru aftur í ár til dystin fús, sjálvt um umstøðurnar eru avmarkaðar. Hildigarð stendur fyri, men hon fær góða hjálp frá øðrum. Í sølubúðini selja tey sodavatn, kaffi, te, køkur og góðgæti. Sølubúðin hevur opið frá dystarbyrjan til nakað eftir dystin. Tað er eisini í sølubúðini, at tey, sum atkvøða um ársins ÍF-ara og tey sum gita í kappingini ÍF TIPS 13, skulu lata seðlarnar inn.

Sjálvt um hølisviðurskiftini ikki eru av teimum bestu, so er tað eisini í sølubúðini, at prátið um dystin, leikararnar og venjaran fer fram - bæði í hálvleikinum og eftir dystin. So verið vælkomin øll somul.

**ÍF TIPS 13 - vinnarin og svarini frá síðstu kappingini**

# Arnar hevði 13 rætt seinast!

Undirtøkan fyri TIPS 13 seinast var einki serlig; ikki tí spurningarnir vóru rímuliga viðkomandi og torleikastigið var ikki so høgt, sum onkuntíð áður. Øll sum veddaðu høvdu fleiri enn 10 rætt. Tann einasti, sum hevði vedda øll rætt, varð Arnar Dam í Kollafirði, og fyri tað fær hann ein Jolly sodavatnskassa frá Føroya Bjór. Samstundis fær hann ein lepa í endaliga lutakastið um flogferðina frá Atlantic Airways. Hvussu torførir spurningar eru hesaferð, fæst við at blaða á bls. 6. Svarið spurningunum og latið síðani seðilin inn í ítróttarhúsið í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst og eisini tit kunnu vinna.

| | | |
|---|---|---|
| 1. Hvussu eitur venjarin hjá Bayern Munchen? | 2 | Felix Magath |
| 2. Hvør skeyt síðsta málið hjá Chelsea ímóti Bayern Munchen týsdagin? | X | Drogba |
| 3. Hvussu æt danin, sum vandi við 1. liðnum hjá ÍF herfyri? | 2 | Morten Larsen |
| 4. Í hvørjum felag var Petur Simonsen venjari síðsta ár? | 1 | HB |
| 5. Hvussu verður útlendski áleyparin hjá B36, Obele Okeke Onyebuchi, vanliga nevndur? | X | Óbi |
| 6. Hvussu eitur formaðurin hjá B36? | 1 | Kjartan Mohr |
| 7. Hvussu eitur venjarin hjá VB? | X | John Christensen |
| 8. Hvussu nógv mál skeyt Símun fyri HB í landskappingini síðsta ár? | 1 | 1 mál |
| 9. Hvør ÍF leikari leikti flest minuttir í landskappingini síðsta kappingar ár (1.620 min.)? | 1 | Karstin Joensen |
| 10. Hvussu eitur hjálparvenjarin hjá HB? | X | Albert Ellefsen |
| 11. Hvør ÍF leikari fekk flest gul kort í landskappingini síðsta ár (5 íalt)? | 1 | Fritleif í Lambanum |
| 12. Hvør ÍF leikari bleiv skiftur út oftast í landskappingini síðsta ár (7 ferðir)? | X | Magni á Lakjuni |
| 13. Hvør er høvuðsstuðul hjá 1. deild monnum hjá NSÍ? | 2 | Burger King |






# Keyp ein tennisbólt

og tú kanst vinna ein Apex-flogferðaseðil.
Í hálvleikinum skulu bóltarnir tveitast út á vøllin.
Tann bólturin, sum liggur næst miðblettinum, vinnur Apex-flogferðaseðilin.

## Kostnaður 30,-

ATLANTIC AIRWAYS

# ÁRSINS ÍF-ARI 2005

## Allan bestur ímóti B36

Í dystinum móti B36 næstsíðsta sunnudag, sum vit taptu 0-2, valdu ákoðararnir Allan at vera besta leikaran á vøllinum. Hann fekk íalt 40 atkvøður, meðan Gunnar fekk 30 á 2. plássi.
Fyri at verða besti leikarin fær Allan ein sunnudagsdøgurða fyri tvey á Restaurant Muntra.

### Støðan

| Leikari | Seinast | Íalt |
|---|---|---|
| Allan | 40 | 40 |
| Gunnar | 30 | 30 |
| Bartal | 19 | 19 |
| Magni | 17 | 17 |
| Eyðolvur | 14 | 14 |
| Sylla | 8 | 8 |
| Jonn | 7 | 7 |

Tann leikarin, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig. Síðan verður talt saman eftir hvønn dyst og úrslitið sæst í leikskránni til komandi dyst. Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst.

Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddina í Ítróttarhúsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst.

## VINNINGAR

Ársins ÍF-ari fær 1.000,-
Nr. 2 fær 500,-
Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3

EILIF ARGE

Restaurant Munta letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár

Restaurant Munta



Tá ið kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Keypssamtøkuni

## ATKVØÐUSEÐIL ÍF-TB, 1. mai 2005

Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hædd í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst. Besti leikarin verður kunngjørdur í komandi leikskrá

Nr 1 (5 stig) ______________________

Nr 2 (3 stig) ______________________

Nr 3 (2 stig) ______________________

Veljari / tel: ______________________



## STØÐAN FORMULADEILDIN - 25. APRÍL

| Lið | D | V | J | T | V - T | S | Heima | Uti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. B36 | 5 | 3 | 1 | 1 | 5 - 2 | 10 | 2 - 0 - 1 | 1 - 1 -0 |
| 2. HB (m) | 5 | 3 | 0 | 2 | 11 - 8 | 9 | 3 - 0 - 0 | 0 - 0 -2 |
| 3. Skála | 5 | 2 | 2 | 1 | 10 - 5 | 8 | 1 - 1 - 1 | 1 - 1 -0 |
| 4. ÍF | 5 | 2 | 2 | 1 | 9 - 9 | 8 | 1 - 0 - 1 | 1 - 2 -0 |
| 5. VB | 5 | 2 | 1 | 2 | 3 - 3 | 7 | 1 - 1 - 2 | 1 - 0 -0 |
| 6. KÍ | 5 | 2 | 1 | 2 | 8 - 9 | 7 | 1 - 0 - 1 | 1 - 1 -1 |
| 7. NSÍ | 5 | 1 | 3 | 1 | 6 - 6 | 6 | 0 - 2 - 0 | 1 - 1 -1 |
| 8. TB (u) | 5 | 1 | 2 | 2 | 6 - 9 | 5 | 1 - 1 - 0 | 0 - 1 -2 |
| 9. EB/Str. | 5 | 1 | 2 | 2 | 4 - 7 | 5 | 0 - 2 - 0 | 1 - 0 -2 |
| 10. GÍ | 5 | 1 | 0 | 4 | 7 -11 | 3 | 0 - 0 - 2 | 1 - 0 -2 |

## LEIKARAHAGTØL FORMULADEILDIN 2005

| | Leikari | Min | D | Ut | Inn | G | R | M | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Allan Joensen | 399 | 5 | 1 | | | | -8 | 41 |
| 2 | Áki Petersen | | | | | | | | |
| 3 | Sverri Ellingsgaard | | | | | | | | |
| 5 | Poul Enniguerð | 450 | 5 | | | | | 1 | 6 |
| 6 | Bartal Eliasen | 284 | 5 | | 2 | 1 | | | 19 |
| 8 | Fritleif í Lambanum | 353 | 5 | 2 | 1 | 2 | | | 2 |
| 9 | Atli Petersen | 59 | 3 | | 5 | | | 1 | |
| 10 | Hanus Eliasen | 315 | 4 | 1 | | | | | |
| 11 | Eyðolv Petersen | 450 | 5 | | | | | | 14 |
| 12 | Gunnar Nielsen | 366 | 5 | 3 | 1 | | | 1 | 30 |
| 16 | Emil Toftegaard | 51 | 1 | | 1 | | | -1 | |
| 17 | Høgni Zachariassen | 450 | 5 | | | 1 | | 2 | 11 |
| 18 | Rúni Eyðunsson Ellon | 397 | 5 | 3 | | | | | |
| 19 | Frank Poulsen | | | | | | | | |
| 20 | Sylla Amed Davy | 402 | 5 | 4 | 1 | 1 | | 1 | 8 |
| 21 | Jonn Sólheim Thomsen | 360 | 4 | | | 1 | | | 7 |
| 28 | Magni á Lakjuni | 264 | 5 | | 3 | | | 2 | 17 |
| 30 | Símun Eliasen | 450 | 5 | | | 2 | | 1 | 5 |

*FRÁGREIÐING: D: Dystir, Min: Minuttir leiktir, Út: Dystir útskiftur, Inn: Dystir innskiftur, G: Gul kort, R: Reyð kort, M: Mál, Stig: í kappingini ársins ÍF-ari*

**Aðrir dystir í formuladeildini í dag - 6. umfar**
KÍ - NSÍ
HB – EB/Streymur
VB – B36
GÍ - Skála

**Dystir í formuladeildini sunnudagin 8. mai – 7. umfar**
Skála - HB
B36 - GÍ
NSÍ - VB
TB - KÍ
EB/Streymur – ÍF

**Dystir í 3. deild sunnudagin 1. mai – 1. umfar**
SÍ - KÍ
Fram - HB
EB/Streymur - Skála
B68 - ÍF
VB - NSÍ

**Málskjúttar formuladeildin**

| | |
|---|---|
| Jonhard Fredriksberg, Skála | 4 |
| Tór Ingar Akselsen, HB | 3 |
| Súni Olsen, GÍ | 3 |
| Atli Danielsen, KÍ | 3 |
| Hans á Lag, HB | 3 |
| Bogi Gregersen, Skála | 3 |
| Christian H. Jacobsen, NSÍ | 3 |
| Óli Johannesen, TB | 3 |
| Obele O. Onyebuchi, B36 | 3 |

**Vert at vita**
Komandi vikurnar hava okkara menn eitt hart "program". Teir skulu spæla íalt 5 dystir fram til 16. mai. Í dag ímóti TB, komandi hósdag 5. mai, sum er Kristi Himmalferðardagur, spæla teir ¼-finalu í kappingini um Løgmanssteypið ímóti HB í Havn, sunnudagin 8. skulu teir til Eiðis at spæla í móti felagsliðnum, mikudagin 11. spæla teir aftur ímóti HB í Gundadali – hesaferð í Formuladeildini – og mánadagin 16. mai, sum er 2. hvítusunnudagur, taka vit ímóti KÍ. So tað er bara at gera seg til reiðar til 5 spennandi dystir komandi tvær vikurnar.

3. deildarliðið hjá okkum spælir í dag ímóti B68 á Toftum. Sunnudagin 8. mai spæla teir ímóti NSÍ heima.

# ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR

## ÍF-LIÐIÐ

1. Allan Joensen
2. Áki Petersen
3. Sverri Ellingsgaard
5. Poul Ennigarð
6. Bartal Eliasen
8. Fritleif í Lambanum
9. Atli Petersen
10. Hanus Eliasen
11. Eyðolvur R.-Petersen (liðsk.)
12. Gunnar G. Nielsen
16. Emil Toftegaard
17. Høgni Zachariassen
18. Rúni Ey. Elttør
19. Frank Poulsen
20. Sylla Amed Davy
28. Magni á Lakjuni
30. Símun Eliasen

**Venjari:**
Petur Simonsen
**Hjálparvenjari:**
Sonni Jensen
**Liðleiðarar:**
Høgni á Lakjuni
Símun Fornagarð
**Fysioterapeut:**
Álvur Hansen

## TB-LIÐIÐ

1. Magni Hentze
2. Búi Mortensen
3. Mortan Enni
4. Olivur Abrahamsen
5. Daniel Nyarko
6. Aca Petrovic
7. Einar Petersen
8. Birgir Rasmussen
9. Allan Poulsen
10. Hallur Christiansen
11. Jón Johannesen
12. Magnus D. West
13. Óli Johannesen
14. Predrag Zivkovic
15. Emmanuel Larbi
16. Niels Rødgaard
17. Aleksander Jovevic
18. Predrag Markovic

**Venjari**
Milan Milankovic
**Hjálparfólk**
Tróndur Nolsøe
Daniel Hofgård


formuladeildin

LASSIN ISAKSEN
Jón Kári og Jóannes

ROYNDIN FRÍÐA